# Chelsea illa rakt av skaðum

Skaðarnir hópa seg upp í enska stórfelagnum Chelsea undan kappingarbyrjan í ensku Premier League. Í gjár hevði felagið eina opna venjing, har 3000 Chelsea-fjepparar vóru møttir at hyggja at stjørnunum, men tær vóru so fáar í tali, at José Mourinho føldi seg noyddan at biðja um umbering yvir fyri teimum mongu áskoðarunum. Av spælarunum, sum ikki kundu venja orsaka av skaðum kunnu nevnast John Terry, Michael Ballack, Wayne Bridge, Didier Drogba, Arjen Robben, Salomon Kalou, Glen Johnson, Andriy Shevchenko, Claude Makelele, Paulo Ferreira, Florent Malouda, Petr Cech og Ashley Cole. Av hesum eru Malouda, Cech og Cole ivasamir til fyrsta dystin í Premier League, meðan hinir heilt víst ikki vera klárir.




# Enn ein leikari til Fulham

Fyrrverandi norðurírski landsliðsvenjarin, Lawrie Sanchez, sum nú er venjari hjá Fulham, heldur fram við at styrkja um hópin. Í gjár gjørdi hann sítt áttanda keyp í summar. Nýggjasti leikarin í hópinum er 22 ára gamli landsliðsleikarin frá Algeria, Hameur Bouazza, sum skal styrkja um vinstru síðuna á miðvøllinum. Hann er komin til felagið frá Watford.

aði bóltin hálvan annan fjórðing upp um B71-málið – og dómarin dømdi horna.

Tíbetur spurdist einki burtur úr hesum hálva møguleika, og so kundu heimaáskoðararnir í staðin gleðast um, at ungi Oddmar Færø, triðja ættarlið av B36-leikarum av sama navni, fekk sína landskappingardebut. Og tað skal verða sagt beinanvegin, at B36 hevur fingið rættiligan fong í hesum 17-ára gamla leikaranum, sum eisini fekk ein fínan debut. Í tveimum førum var hann nær við at skora, men tað gekk ikki hjá honum at fáa bóltin í málið í hansara fyrsta dysti.

Men Sylla, sum í longum løtum var rættiliga anonymur, vísti 10 minuttir fyri tíð sín kvalitet, tá hann í hornatøkum við Vieira gjørdist hin sterkari, smeyg sær inn í brotsteigin, og so hevði Símun Rógvi í B71-málinum ongan møguleika at forða fyri 3-0 til heimaliðið.

Eftir hetta hevði B36 fleiri heilar og hálvar møguleikar at økja um leiðsluna. Tann allarstørsta, tá Sylla ógvuliga óprofessionelt varð feldur í brotsteiginum á veg út úr honum. Men henda gylta møguleika fyri at skora hattrick hamraði ivorianarin einar tveir metrar upp um málið mitt fyri, og so endaði dysturin 3-0.

B71 iðrar seg uttan iva um misnýttar møguleikar, meðan Kurt Mørkøre helst gleðist um innsatsin hjá Jákup Mikkelsen í málinum og ótroyttiliga arbeiði hjá Mikkjali á miðvøllinum.

# Hetta umfarið var søguliga langt

**Á vøllinum er spenningurin í toppinum tann sami, og á skrivaraborðinum átti spurningurin um veðrið og fótbóltin at verið viðgjørdur**

FORMULA DEILDIN
17. UMFAR

*Jóannes Hansen*



*Øll oddaliðini fingu fult í 17. umfari, og tí er einki broytt í oddinum. Í botninum økti KÍ um munin niður til tey bæði botnliðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

17. umfar 2007 í bestu deildini gjørdist søguligt. Neyvan nakrantíð áður man tað vera komið fyri, at teir fimm dystirnir í einum umfari hava verið spældir yvir fýra leikdagar. Soleiðis var tað hesa ferð: KÍ-Skála leygardagin, NSÍ-GÍ og VB/Sumba-EB/Streymur sunnudagin, HB-AB týsdagin og B36-B71 mikudagin. Summarfestivalurin og nýggja graslíkið í Gundadali vóru orsøkin til, at tað umframt sunnudag eisini varð spælt hinar dagarnar.

Heima á landi hevur tað verið undantakið, at ikki allir dystirnir hava verið spældir um somu tíð. Aðra staðni er tað heilt vanligt, at dystirnir verða lagdir soleiðis. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst at finna uttanfyri tey, sum beinleiðis hava við fótbóltin at gera..

Nú eru tað ikki fótbóltssambondini, sum sjálvi gera av, hvussu kappingin verður løgd. Fótbóltur er gott sjónvarpstilfar, og rásirnar, sum eiga rættindini at varpa frá fótbóltskappingum, gera av, nær dystirnir skulu spælast.

Danmark er gott dømi um hetta. Tað plagdi at vera soleiðis, at allir dystirnir vórðu spældir um somu tíð sunnudag. Nú verður spælt leygardag, tríggjar tíðir sunnudag og so aftur mánakvøld. Hesa ársins tíðina verða dystir eisini spældir mitt í viku. Tað kemst av altjóða luttøkuni hjá feløgunum.

Í Føroyum hevur tað verið sjálvfylgja, at umførini eru seinnapart sunnudag. Soleiðis er tað ikki í eitt nú Íslandi og Svøríki. Har hevur tað altíð verið undantakið, at allir dystirnir hava verið spældir seinnapartin sunnudag. Onkrir dystir eru í vikuskiftinum, men teir flestu eru mitt í viku. Tá ið síðstu umførini eru á skránni, verður sjálvandi spælt somu tíð.

Tað kennist hugaligari og meiri intenst, tá ið alt verður avgreitt í senn. Men tað eru eisini fyrimunir við at spjaða dystirnar yvir summarkvøldini. Fyri skrivaðu pressuna hevði tað ikki verið so galið, at fleiri dystir vóru mitt í viku. Tað hevði borið við sær, at arbeiðstrýstið ikki hevði verið so nógv savnað í vikuskiftinum, sum tað nú er.

Undir øllum umstøðum hevði tað verið skilagott, um ein meiri eyðsýndur veðurventilur hevði verið lagdur inn í kappingina. Tað er rættuliga forargiligt fyri bæði spælarar, venjarar, kassameistarar og onnur ábyrgdarfólk og áskoðarar, tá ið tað verður spælt og kappast undir umstøðum, sum ikki eru fótbólti verdugar.

Síðsta dømi um hetta var leygardagin, tá ið Skála við fylgi var í Klaksvík. Tá var veðrið soleiðis, at dysturin átti at havt verið útsettur. Í praksis hevði tað ongan týdning havt, um skálafólk fóru til hús leygardagin og koyrdu hálva tíman norður aftur sunnudagin, mánakvøldið ella týskvøldið.

Í Føroyum er tað soleiðis, at um tað er ódnarveður ein dag, so er tað ógvuliga sannlíkt, at veðrið verður heilt gott næstu dagarnar. Síðani sunnudagin hava líkindini at spæla fótbólt í Klaksvík verið framúr.

Í sjálvari kappingini stendur tað verri til hjá teimum undir strikuni, enn tað gjørdi undan hesum umfarinum. VB/Sumba vísti góðan hugburð, men misti á stokkinum, og AB hevði heilt lítið at bjóða upp á, tá ið argjamenn taptu stórt ímóti HB. At KÍ samstundis fekk fult ber við sær, at botnliðini í trimum av teimum tíggju umførunum, sum eru eftir, skulu fáa fulla úrtøku, meðan klaksvíkingar einki fáa.

Oddaliðini vunnu bæði, og EB/Streymur og HB gjørdu eisini sítt. Um HB vinnur sunnudagin í Streymnesi, so verða meistararnir av álvara við í kappingini um heiðursmerkini.

Allir dystirnir í 18. umfari eru ásettir at vera somu tíð sunnudagin, tá ið eingin dystur verður í Gundadali: EB/Streymur-HB, AB-NSÍ, GÍ-KÍ, Skála-B36 og B71-VB/Sumba.

## Formulaliðið



## FAKTA

**B36-B71 3-0 (1-0)**
1-0 Klæmint Matras (25)
2-0 Ahmed Davy Sylla (54)
3-0 Ahmed Davy Sylla (81)

**B36:** Jákup Mikkelsen – Jóhan V. Gunnarsson, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex J. Dos Santos - Heini í Skorini (Oddmar Færø, 72.), Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen, Ingi Højsted (Bergur Midjord, 46.), Hanus Torleifsson (Kenneth Jacobsen, 88.), – Ahmed Davy Sylla
**Gul kort:** Klæmint Matras og Mikkjal Thomassen
**B71:** Símun Rógvi Hansen – Eirikur Poulsen, Anders Rasmussen, Fabio Vieira, Magnus Olsen - Gudmund Nielsen (Mikkjal T. Hentze, 58.), Flavio Santana, Wellington Soares, Rasmus Nielsen (Jónsvein Thomsen, 73.), Símun Hansen (René Clementsen, 85.) – Clayton Soares
**Gul kort:** Gudmund Nielsen og Wellington Soares

formuladeildin

| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 17 | 12 | - | 2 | - | 3 | 31 | 15 | 16 | 38 |
| 2 | B36 | 17 | 11 | - | 4 | - | 2 | 32 | 11 | 21 | 37 |
| 3 | EB/S | 17 | 10 | - | 2 | - | 5 | 29 | 21 | 8 | 32 |
| 4 | HB | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 35 | 23 | 12 | 27 |
| 5 | Skála | 17 | 7 | - | 2 | - | 8 | 20 | 25 | -5 | 23 |
| 6 | GÍ | 17 | 6 | - | 5 | - | 6 | 25 | 34 | -9 | 23 |
| 7 | B71 | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 28 | 31 | -3 | 21 |
| 8 | KÍ | 17 | 5 | - | 3 | - | 9 | 25 | 26 | -1 | 18 |
| 9 | AB | 17 | 2 | - | 4 | - | 11 | 19 | 35 | -16 | 10 |
| 10 | VB/S | 17 | 2 | - | 4 | - | 11 | 15 | 38 | -23 | 10 |